# Tríggjar metrar upp á tíggju ár

*Fyriskiparararnir lata væl at vøkstrinum í viðarlundini í Vestmanna. Summi træsløg klára seg betri enn onnur, men fjølbroytni í viðarlundini skal varðveitast, verður sagt*

DÁNJAL HØJGAARD

Fyri tíggju árum síðani gróðursetti Rói Joensen, sum tá gekk í 10. flokki í Vestmanna , eitt træ omanfyri Vestmanna skúla. Eitt træ er kanska ov mikið sagt, tí í veruleikanum var tað ein 15 centimetrar langur runnur, hann setti niður í jørðina.

Í dag er Rói ein vaksin maður og runnurin er blivin til eitt snøgt Sitka granntræ, sum er tríggjar metrar høgt.

Fyri tíggju árum settu skúlanæmingarnir og aðrar góðar kreftir í Vestmanna tey fyrstu 600 trøini í tí fyrsta økinum, sum sett varð av til nýggju viðarlundina í bygdini. Í dag telur virðarlundin 6.000 smærri og størri trø, sum standa á einum øki, ið er 18.000 fermetrar til víddar.



### Veksa væl

- Tað er altíð ein gleði at síggja, at tað fer at spretta um várið, og somu gleði hava vit upplivað við hesi viðarlundini, sigur Finnbogi Joensen, sum hevur verið undangongumaður fyri viðarlundina øll árini. Hann er formaður í nevndini fyri viðarlundina, og saman við hinum nevndarlimunum hevur hann nýtt nógvar óløntar tímar til trøini..

Sjálvur heldur Finnbogi, at viðarlundin hevur verið væleydnað. Hóast trupulleikar hava verið, so hava trøini sum heild vaksið væl, sigur hann meðan hann vísir okkum kring um á økinum. Í lægdunum, har lývd er, sær út til at veksa væl. Í støðum, har tað er meira ábært, sær tað meira berligt út.

### Fýra metrar

Størsta træið í viðarlundini í Vestmanna er í dag fýra metrar høgt. Tað er eitt leyvtræ, eitt sokallað Bornholmskt roynitræ, sum ein skúlanæmingur setti niður á sumri 1990. Allir næmingar, sum eru byrjaðir í 1. flokki í Vestmanna Skúla hesi árini eru slopnir at gróðurseta sítt egna træ í viðarlundini. Næmingarnir hava fingið ognarbrøv tillutaði og trøini eru skrásett í nummarrøð.

Størsta træið í viðarlundini hevur nummar 2. Tað eru sjey sløg av trøum í viðarlundini í Vestmanna. Fýra sløg av nálatrøum og sjey sløg av leyvtrøum, men øll sløgini hava ikki klára seg ikki líka væl.

-Tey, sum hava klárað seg best eru lerkatrøini, Sitka granntrøini og Bornholmsku roynitrøini, sigur Finnbogi Joensen. Men hóast summi trø – eittnú nálatrøini – standa seg væl, so er hugskotið við viðarlundini, at hon skal rúma so nógvum ymiskum trøum sum tilber.

- Hetta tryggjar tað rætta litspælið, sigur Finnbogi og sipar til teir gulu og reyðu litninir, sum koma til sjóndar, tá leyvið fellur um heystið. Eyguni skulu eisini hava sítt.

Enn tú ikki rættiliga kensluna av, at tú gongur í eini viðalund, tá ið tú spákar millum runnar og trø í Vestmanna. Men sjøtil er settur á. Sum Finnbogi Joensen málber seg:

-Viðarlundin í Vestmanna er komin fyri at vera.



*Nálatrøini veksa væl og skjótt í viðarlundini í Vestmanna, kann primus-motor, Finnbogi Joensen staðfesta. Eftir tíggju árum er ein líti runnur blivin til eitt tríggjar metrar høgt nálatræ.*

## Seyðurin etir trøini

Størsti fíggindin hjá viðarlundini í Vestmanna er seyðurin. Seyður sleppur inn á økið, har viðarlundin er og ger sær dælt av trøunum. Seyðurin legst serliga á leyvtrøini at gnaga og ger stóran skaða um seg. Sporini eftir teir óbodnu gestirnar síggjast kring um í viðarlundini. Sambært Finnboga Joensen er tað bert ein loysn á hesum trupulleika, og tað er at bøurin verður vetrarfriðaður. Einans á hendan hátt slepst undan, at seyður ikki sleppur framat trøunum. Ætlanir eru um at vetrarfriða bøin í Vestmanna.

# Scillykappingin

*Í framtíðini verður tað Róðrarsambandið, ið situr við róðrið, tá tað snýr seg um kappróðurin á Scillyoyggjunum. Í hesum sambandi fara nakrar broytingar fram við viðvíkjandi kappingini og kapping verður nú um plássini*

DAGFINN OLSEN

Í 3 ár hava føroyskar kappróðrarmanningar luttikið í kappróðri í gig á Scillyoyggjunum. Tað var Amerada Hess og seinni The Faroese Partnership, ið fingu hetta í lag og hava stuðlað.

Nú verður latið til Róðrarsambandið at umsita hetta, hóast stuðlarin er hin sami. Petur Even Djurhuus frá The Faroese Partnership segði á tíðindafundi í gjár, at endamálið við slíkum stuðli er, at tiltakið skal halda fram, fáa egið lív. Hann fegnaðist um, at henda roynd at geva róðrarfólki ein møguleika, ið tey høvdu havt trupult við at troytt sjálvi, er eydnast.

Nú Róðrarsambandið skal umsita peningin og tiltakið viðvíkjandi róðrinum á Scillyoyggjunum, verða eisini broytingar gjørdar.

Áður slapp vinnarin hjá 10 mannaførum við monnum at luttaka. Í ár skavaðu kvinnurnar á Jarnbardi eisini saman til luttøkuna og vístu seg sum sonn konubrot, sum tikið varð til á tíðindafundi hjá Róðrarsambandinum í gjár.

Róðrarsambandið hevur valt at taka eitt ár í senn, m.a. tí tað er sera kostnaðarmikið at senda fólk avstað, men greitt er, at í framtíðini fara tvær manningar at luttaka. Mannfólk og konufólk.

Hjá monnum skulu manningarnar í 6, 8, og 10 mannaførum kappast um at manna bátin á Scillyoyggjunum og hjá kvinnum skulu kvinnurnar í 5 og 6 mannaførum kappast.

Báturin, ið hevur flest stig, vinnur. Eru bátar javnir, eru serstakar reglur fyri hesum.

Orsøkin til, at tað ikki longur bert er kapping millum 10 mannaførini, sigur Róðrarsambandið vera, at sambandið hevur skyldu yvirfyri øllum. Orsøkin til, at t.d. FM vinnarin hjá 5 mannaførum hjá drongjum ikki er við í kappingini er, at róðurin á Scillyoyggjunum er sera harður og teinurin langur. Mett verður eisini, at hesir fáa møguleikan, um teir halda fram at rógva. Hesir hava tó ikki púrt einki at kappast um, tí umframt FM heitið, hava teir eisini møguleika at sleppa til Sorø at rógva.



*Á tíðindafundi í gjár boðaðu Róðrarsambandið og umboð fyri The Faroese Partnership frá broytingum viðvíkjandi kappróðrinum á Scillyoyggjunum*

Frammi hevur verið, at møguliga skal nýggj gig byggjast til føroysku rógvararnar. Møguliga, tá olja verður funnin við Føroyar, hevur argandi og skemtandi verið tikið til. Einki er tó avgjørt hesum viðvíkjandi.

Heldur ikki er avgjørt, hvørt skipað verður so fyri, at fjepparar kunnu sleppa við á ferðini. Her verður mett, at ferðamannastovur og onnur eisini mugu inn í myndina.

Stuðlarnir, oljufeløgini, eru fegin um broytingarnar, ið eru gjørdar, tí sostatt er kappingin vorðin breiðari, verður mett.

Sostatt er ikki bert FM heitið at kappast um í føroyskum kappróðri, men eisini luttøka í kappróðri uttanfyri landoddarnar.

Róðurin á Scillyoyggjunum verður í framtíðini bert róptur Scillykappingin.



# Av gamla slagnum

*Níggju danir í trimum ellisakførum hava vitjað landið hesa vikuna. Teir bilkátu mennirnir halda ikki, at ein og hvør kann meta um virði á teirra bilum*



DÁNJAL HØJGAARD

Teir siga, at hann er tann einasti av sínum slagi í danska kongaríkinum. Rover-bilurin, árgangur 1937 hjá familjuni Gry úr Norður-Jútlandi. Familjan Gry er limur í danska felagnum fyri ellisakfør, Nordjysk Vintage Klub, sum hevur verið á ferð í Føroyum við trimum veteranbilum hesa vikuna. Níggju fólk og tríggir ektaðir veteranbilar komu til Føroya við Norrønu mánadagin og alla hesa vikuna hava tey rulla kring landið í teirra gomlu bilum.

Umframt Rover-bilin hjá familjuni Gry var ein sonevndur MG frá 1952 – ein Morris Garage við kalesju - við á ferðini. Triði bilurin var ein Chevrolet-lastbilur frá 1929. Hetta var eitt sonevnt »grísahandilsmannamodell«, søgdu teir blíðu bileigararnir, og spurdu um vit ikki mintust bilin, sum Buster Larsen koyrdi við í Matador.

### Karburatorurin datt av

Grísa-bilurin var tó steðgaður upp dagin fyri. Karburatorurin var dottin av, og tískil slapp hann at standa eftir uttanfyri hotellið í Havn. -Hann virkaði annars so væl, ja, líka til í gjár, flennir eigarin, sum kortini hevði góðar vónir um at fáa bilin við sær heimaftur til Danmarkar. -Við eitt sindur av stáltráði at surra karburatorin fastan við, man tað nokk fara at ganga, skemtaði hann.

### Persónligt virði

Gamli bilar kunnu ikki sammetast við gomul frímerki, fáa vit at vita. Hóast teir eru gamlir so hava bilarnir ikki tað stóra marknaðarvirðið. Rover-bilurin t.d. – sum er tann einasti av sínum slagi í Danmark - hevði møguliga ikki farið fyri meira enn 150.000 krónur. Fyri tað fyrsta má nýggi eigarin duga at umvæla bilin, annars steðgar hann upp beinanvegin. Fyri tað næsta er tað ikki bara sum at siga tað, at skilja seg av við ein veteranbil, sum tú hevur lagt nógvar arbeiðstímar í. Haraftruat er tað ein spurningur um útboð og eftirpurning. - Tað ber ikki til at seta virði á ein slíkan bil, sigur Preben Gry, sum er næstformaður í Nordjysk Vintage Klub. - Hetta er nakað, sum tú hevur nýtt ein stóran part av lívi tínum til, sigur hann og hyggur næstan eymliga at sínum gamla Rover.



*Tað er týðiligt, at Jens Gry er sera stoltur av kølarafigurinum, sum prýðir Rover-bilin hjá familjuni. Hann máttu tey stoypa av nýggjum, tí tann upprunaligi var farin fyri skeyti*

**Mynd: Jens Kr. Vang**


